*Føroya Arbeiðarafelag leggur nú alt landið lamið:*

# Ongin kavarudding næstu fer tað kavar

*Ósemja ímillum Landsverkfrøðingin og Føroya Arbeiðarafelag hevur nú ført til, at næstu ferð tað fer at kava, verða vegirnir ikki ruddaðir, Tað verður heldur ikki hvørki salt ella sandur koyrt á vegirnar um tað verður hált*

Áki Bertholdsen

Nú kann tað væl henda, at alt landið verður mestsum lagt lamið næstu ferð, tað verður kalt og kavi.

Føroya Arbeiðarafelag hevur nevniliga gjørt av nokta limum sínum at rudda kava fyri landsverkfrøðingin, næstu ferð, tað fer at kava.

Arbeiðsfólkið sleppur heldur ikki at koyra salt, ella sand á vegirnar, um tað verður hált.

Tað er ein ósemja ímillum Landsverkfrøðingin og Føroya Arbeiðarafelag, sum nú hevur ført til, at alt arbeiðið hjá Landsverkfrøðinginum, ið hevur samband við kava og kulda, verður lagt lamið.

Og tað kann vísa seg, at tað verður rættiliga skjótt brúk fyri teimum monnunum hjá Landsverkfrøðinginum, sum fáast við hetta arbeiðið.

Tí eftir veðurforsøgini verður hann norðan í ættini týsdagin og mikudagin í næstu viku við avfalli, fyrst sum regni og síðani kanska sum kava. Hitin fer at liggja um frostmarkið.

Heldur forsøgnin, og tað fer at kava, fer tað at leggja alla ferðslu á landi lamna, tí so verður ongin at rudda kavan av vegunum.

Og hetta fer at uttan iva at fáa álvarsligar avleiðingar fyri nógv arbeiðspláss, skúlar og stovnar, tí nógv fólk ferðast ímillum bygdir hvønn einasta dag.

### 14 krónur um tíman

Ósemjan snýr seg um tilkallivaktirnar hjá teimum, sum skulu rudda kava.

Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað stendur í sáttmálanum, at menninir eiga 14 krónur um tíman fyri at vera tøkir á tilkallivakt mitt í viku og 28 krónur um vikuskiftini

– Men Landsverkfrøðingurin hevur gjørt sína egnu lýsing av hugtakinum „Tilkallivakt“, sum vit undir ongum umstøðum kunnu taka undir við, sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur ásannað, at frá 1. oktober til 1 mai kann roknast við, at tað verður neyðugt at fara út hvønn morgun, um líkindi eru so, at ferðslan kann verða tarnað av hálku, kava, áarlopi, omanlopi ella øðrum.

Somuleiðis verður sagt, at meginreglan er, at er ivaveður, eiga menninir at fara út.

– Men kortini er Landsverkfrøðingurin ikki sinnaður at gjalda monnunum tilkallivakt, uttan at teir dagin fyri hava fingið greið boð um, at teir kunnu rokna við at verða boðsendir morgunin eftir, men at teir kortini ikki verða boðsendir, sigur Ingeborg Vinther

– Hetta merkir, at í veruleikanum skulu teir standa tøkir hvønn einasta dag til út ímóti midnátt, har teir so brádliga kunnu fáa boð um, antin teir skulu møta, ella ikki, uttan at fáa samsýning fyri tað, og tað góðtaka vit ikki, sigur hon.



*fyri, at tað fer at kava. Men tá verður ongin kavarudding og tað verður heldur ikki slat ella sandur stroyddur á vegirnar*




## Eingin sleptur upp á fjall

Áki Bertholdsen

Í gjáramorgunin bar útvarpið tey tíðindi frá óðum foreldrum, at lærararnir, sum blokeraðu skúlarnar í Havn, høvdu gingið inni í skúlunum, hóast teir ikki høvdu rætt til at vera á skúlunum, so leingi teir eru í verkfalli. Men børnini, tey máttu ganga uttanfyri í øllum regninum.

Hesum afturvísa lærararnir.

Umboð fyri lærararnar, sum blokeraðu sigur, at lærarnir gingu uttanfyri.

Teir siga, at lærararnir blokeraðu ikki skúlarnar, sum teir arbeiddu í, so teir høvdu heilt einfalt ikki lyklarnar til skúlarnar.

– Har foreldur koyrdu børnini í skúla, fóru vit yvir til bilarnar, áðrenn nakar kom úr og boðaðu frá støðuni, so at tað ikki var til óneyðugan ampa.

– Og har børnini komu einsamøll í skúla, fingu tey høvi at ringja eftir foreldrunum.

– So tað vórðu ongi børn slept upp á fjall, siga lærararnir.

### Fingu eitt prei

Tað skiltist eisini aðrastaðni, at fleiri høvdu fingið eitt prei um støðuna, ikki minst tey, sum høvdu langt í skúla, tí við nógvar skúlar var tómligt klokkan átta í gjáramorgunin.

## Gift teg á Velbastað

John Johannessen

Næstan fimti ár eru liðin síðani sjónleikur seinast varð spældur á Velbastað. Men nú eru eru ungmannafelagið Sólarmagn á Velbastað og í Kirkjubø farið at venja skemtileikin, Gift teg, eftir norðmannin, Torvald Tu.

Hesin leikurin er júst tann sami, sum varð leiktur í bygdini fyri um fimti árum síðani. Um ta tíðina vórðu tveir leikir leiktir í bygdini, og vóru teir Magnus hjá Dalabóndum og Gift teg.

Sjey leikarar eru við í venjingunum. Tey eru ungfólk av Velbastað, úr Havn úr Nólsoy. Hesi hava øll royndir innan sjónleikaheimin, men kortini hevur eingin teirra áður roynt seg sum sjónleikara á Velbastað.

Tað vóru Eva Brekkstein og Amalia Danielsen, ið tóku stig til at fara undir at venja sónleik í vetur. Hetta gjørdu tær fyrst og fremst tí, at tær hava ógvuliga stóran áhuga fyri sjónleiki, men eisini fyri at fáa lív í aftur virksemið í ungmannafelagnum.

Gift teg verður frumframførdur í Sólarmagn á Velbastað annan páskadag klokkan 16.

Leikurin snýr seg um fólk, sum skulu giftast. Summi tí tey eru góð við hvørt annað, onnur tí tey hugsa bert um pengar. Persónarnir eru millum annað ein pengargrísk bóndakona, ein forelskaður bóndasonur, ein gamal ríkmaður, sum øll ynskja at arva umframt onnur.

## Várkonsert á Glyvrum

John Johannessen

Væl umtókta Eystankórið fer sunnudagin undir leiðslu av Símuni Nónklett at halda sína árligu várkonsert.

Konsertin verður í Glyvra kikrju sunnudagin klokkan 17, og verður skráin sera fjløbroytt. Framførdir verða føroyskir, danskir, svenskir og amerkanskir sangir.

Afturat hesum verða eisini vekini The Lost Cord ac Arthur Sullivan og Ave Verum av Franz List framførd.

Við orglið í Glyvra kirkju sunnudagin situr Jensina Simonsen og afturat henni hava Bodil Simonsen og Fríðhild Hansen floytufylgispæl.



# Fóru heimaftur í øllum góðum

*Allastaðni var friðarligt, tá ið sáttmálasettir lærarar blokeraðu úthurðarnar á stóru skúlunum kring landið*

**Læraraverkfallið**

Áki Bertholdsen

Nú er verkfallið hjá lærarunum harnað og í gjár forðaðu teir sáttmálasettu lærararnir skúlagongdini í nógvum av teimum stóru skúlunum kring landið.

Tíðliga í gjáramorgunin møttu teir sáttmálasettu lærararnir upp á teimum stóru skúlunum kring landið og blokeraðu úthurðarnar, so at ongin slapp í skúla, hvørki næmingar ella hinir lærararnir, sum ikki eru í verkalli.

Men allastaðni var friðarligt burtursæð frá onkrum einstøkum foreldrum, sum ikki krógvaðu sína misnøgd við at vera farin heimanífrá við smáum børnum henda illfýsuta fríggjarmorgunin og onki fáa burturúr-uttan karm.

Teir skúlarnir, sum blivu blokeraðir í gjár vóru allir skúlarnir í Havn og í Klaksvík, teir báðir skúlarnir á Tvøroyri, umframt skúlin á Strondum, Felagsskúlin á Oyrabakka og Meginskúlan á Sandi.

Ann Lis Sverradóttir, sum er í samskipanarbólkinum hjá sáttmálasettu lærarunum, sigur, at tað er ikki óhugsandi at fleiri tiltøk verða sett í verk í næstu viku, um ikki okkurt hendur.

– Vit eru ikki nóg nógv í tali til at vit fáa blokerað allar skúlarnar, so vit hava valt teir skúlarnar, har vit halda, at tað merkist mest, sigur hon.

Hon sigur, at orsøkin til hetta stigið er sjálvsagt, at verkfallið nú hevur vart so leingi uttan at nakað hendir

– Nú er tolið hjá okkum uppi og skúlagongdin er heilt óforsvarlig, tí alt liggur í sori. Og vit kunnu ikki góðtaka, at skúli verður hildin undir hesum umstøðunum.

Í einum skrivi, sum tey hava gjørt til blokaduna, siga tey, at nú er tolið uppi.

— Vit hava nú verið í arbeiðssteðgi í meiri enn fýra vikur og fólkaskúlin liggur í skeljasori. Skúlaleiðslurnar vísa á, at skúlagongdin er púra óforsvarlig og tað kann ikki vera rætt at halda skúla undir hesum treytum og tí halda vit, at tíðin er búgvin til at blokera skúlarnar, siga læraranir, ljóðar í almennu fráboðanini frá lærarunum, sum blokera.



*Í Suðuroynni vóru bara skúlarnir á Tvøroyri blokeraðir. Her er skúlastjórin, Martin Eidesgaard á veg í skúla, men hann mátti avstað aftur, sum øll onnur*




*Á Eysturskúlanum í Havn møttu nógv fólk, men tey máttu øll avstað aftur. Alt gekk tó friðarliga fyri seg og øll fóru heim í øllum góðum, uttan okkurt einstakt foreldur, sum ikki krógvau sína misnøgd*

## Vilja hava løgtingið upp í málið

Skúlanevndirnar átala nú støðuna í fólkaskúlanum, og fara partarnir ikki aftur til samráðingar, fara tær at heita á løgtingið um at leggja upp í.

Hetta boða tey frá í einum skrivi, tey hava sent út, eftir at formansskapurin fyri skúlanevndir fyri framhaldsdeildirnar í Føroyum hildu fund hósdagin.

– Vit taka ikki dagar partanna ímillum, men vit krevja, at partarnir fara aftur til samráðingarborðið beinanvegin, verður sagt í skrivinum.

– Um samráðingarnar ikki verða tiknar uppaftur leygardagin (í dag, blðm.), fara skúlanevndirnar at heita á løgtingið um at taka neyðugu stigini, so skúlagongdin kann takast uppaftur.

**ek**



*Í Klaksvík høvdu lærara sett stillað seg sjálvar og bilar í vegin við innkoyringina til skúlarnar*

